umhvørvisstovan

ELFELAGIÐ SEV
LANDAVEGUR 92
POSTBOX 319
110 TÓRSHAVN

Argir hin 14. desember 2011
Málsnr.: 11/00409-16
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Suni Petersen

**Góðkenning av umhvørvisárinsmeting fyri vindmyllur í Neshaga**

Umhvørvisstovan góðkennir hervið, sambært § 16, stk. 1 í elveitingarlógini[1], umhvørvisárinsmeting fyri tríggjar vindmyllu hjá Elfelagnum SEV í Neshaga.

## 1. Endamál

Endamálið við umhvørvisárinsmetingini er at tryggja, at ávirkanin av verkætlanini á náttúru, umhvørvi og onnur viðurskifti er væl lýst, so at sleppast skal undan óvæntaðum avleiðingum av verkætlanini.

## 2. Umsókn og málsviðgerð

SEV sendi hin 10. juni 2011 Umhvørvisstovuni uppskot til umhvørvisárinsmeting til góðkenningar. Dagførd árinsmeting varð latin Umhvørvisstovuni hin 24. oktober 2011. Ískoyti til umhvørvisárinsmetingina, sum er kortlegging av vøkstrinum við Nesvatn og Eystnes, ið Føroya náttúrugripasavn hevur gjørt, varð latið Umhvørvisstovuni hin 18. november 2011.

### 2.1 Umhvørvisárinsmetingin

Umhvørvisárinsmetingin viðgerð m.a. ampar av óljóði og skuggakasti í Æðuvík, ávirkan á djóra og plantulívið á staðnum og hvussu vindmyllurnar síggjast í landslagnum.

Gjørdar eru útrokningar av óljóði og skuggakasti frá vindmyllunum í Æðuvík, ið er næsta bygd. Hesar vísa, at vindmyllurnar lúka markvirðini[2] fyri óljóð frá vindmyllum. Eisini vísa útrokningar, at vegleiðandi markvirði fyri skuggakast er lokið.

Sambært umhvørvisárinsmetingini kann roknast við ávísari ávirkan á fuglalívið í nánd av vindmyllunum, men mett verður, at tað serliga er um ferðslan verður økt tá vegur verður gjørdur, sum kann órógva fuglin. Tí mælir SEV í árinsmetingini til, at ferðslan verður avmarkað, og at vegurin verður stongdur fyri almennari ferðslu.

[1] Løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni, við seinni broytingum.
[2] Markvirðini eru ásett í umhvørvisgóðkenning

Kortleggingin av vøkstri í økinum vísir eitt rættiliga slagríkt øki við teimum vanligu plantusløgunum í føroyska haganum í umleið 100 metra hædd.

Føroya náttúrugripasavn mælir til, at nóg mikið av rørum verða løgd undir vegin, fyri at væta kann seta undir vegin, og at vatnavveiting ikki verður gjørd í økinum. Eisini verður mælt til at flag frá vegagerðini verður lagt aftur fram við vegjaðaran.

## 2.2 Hoyring

Hin 25. oktober 2011 varð umhvørvisárinsmetingin send til almenna hoyring við lýsing í bløðunum og á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni. Eisini varð frágreiðingin send ávísum almennum stovnum. Freistin at koma við hoyringssvari var 7. desember 2011.

Umhvørvisstovan hevur fingið hoyringssvar frá einum borgara í Æðuvík, frá Føroya náttúruverndarfelag og Føroya fuglafrøðifelag.

Borgarin í Æðuvík sigur, at tey hava ampar av bæði óljóði og skuggakasti frá verandi vindmyllum í Neshaga, og mótmælir tí, at fleiri myllur verða settar upp.

Mótmælið er sent til SEV, sum hevur sent Umhvørvisstovuni sítt svar. Víst verður á, at ætlaðu nýggju vindmyllurnar verða settar uttast á Eystnesi, sum er longur burtur frá bygdini enn verandi myllur, og at myllurnar lúka nýggju og strangari markvirðini fyri óljóð. Eisini verður víst á, at skuggakast í Æðuvík bara kann koma fyri í november, desember og januar, tá sólin stendur lágt. Sunnastu húsini í Æðuvík, ið eru næst myllunum, verða tí í mesta lagi rakt av skuggakasti í 10 tímar um árið, sum verður brúkt sum vegleiðandi markvirði fyri skuggakast.

Føroya náttúruverndarfelag, FNU, fegnast um at fáa meira grøna elorku, men mælir til, at ferðslan á vegnum út til myllurnar verður avmarkaður, og at bummur verður settur upp, fyri at forða fyri hesum.

Føroya fuglafrøðifelag heldur, at áðrenn inntriv verða gjørd í náttúruna, sum t.d. uppseting av vindmyllum, eigur økið at verða undir umsjón í minsta lagi í eitt ár. Felagið mælir eisini frá, at vegurin til økið skal kunna brúkast til akfør hjá privatfólki.

## 2.3 Friðingarmyndugleikarnir

Ætlanin at seta vindmyllur upp uttast í Neshaga og vegagerðin í tí sambandi er góðkend av Náttúrufriðingarnevndini fyri Eysturoyar sýslu hin 21. januar 2011, og er avgerðin staðfest av Yvirfriðingarnevndini hin 25. mars 2011.

## 3. Avgerð

Umhvørvisstovan góðkennir umhvørvisárinsmetingina hjá SEV frá oktober 2011 við ískoyti um vøkstur við Nesvatn og Eystnes frá november 2011.

Treytir fyri góðkenningini eru

- at verkætlanin verður framd sum greitt er frá í umhvørvisárinsmetingini.
- at vegurin út til myllurnar verður stongdur fyri almennari ferðslu fyri at forða fyri óneyðugari ávirkan á fugla- og djóralívið í økinum.

Um fleiri vindmyllur skulu setast upp á staðnum, skal nýggj umhvørvisárinsmeting gerast, sum skal góðkennast av Umhvørvisstovuni.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um neyðugt er við øðrum góðkenningum sambært aðrari lóggávu.

## 4. Kæra

Henda avgerð kann kærast til landsstýrismannin við innlendismálum. Møgulig kæra skal sendast til Umhvørvisstovuna, sum sendur kæruna til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí at avgerðin er almannakunngjørd. Kærur skulu vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi hósdagin 12. januar 2012.

Jóhanna Olsen, stjóri

Suni Petersen, deildarleiðari

**Avrit**: Elveitingareftirlitið - Brekkutún 1 - Postsmoga 3059 - 110 Tórshavn
Nes kommuna - Toftavegur 3 - 50 Toftir
Rúnavíkar kommuna - Heiðavegur 26 - 600 Saltangará